planet.fo

Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo

planet.fo













# Ungt Virkið byrjar í dag

Ungt Virkið er á torginum í SMS í dag og fram til leygardagin. Í dag lat Johan Dahl, landsstýrismaður upp kappingina, og leygardagin fellir avgerðin, og vinnarin verður kosin.

Til ber at síggja básar hjá teimum ymsu bólkunum í SMS.

**Ungt Virki**

Síðan skúlaárið 1996-1997 hevur Ungt Virki verið eitt tilboð til næmingar á støðisárinum á Føroya Handilsskúla. Eisini í ár hevur Tekniski Skúlin í Klaksvík eisini bjóðað næmingum at vera við í Ungt Virki. Næmingarnir skulu stovna virki, sum teir reka í skúlaárinum og síðani taka av, tá ið árið er úti. Hetta verður gjørt fyri at vekja teirra áhuga at skapa nakað sjálvstøðugt.

**Ungt Virki í Føroyum**

Ungt Virki í Føroyum er partur av Ung Virksomhed í Danmark, sum byrjaði í 1993 eftir áheitan frá Ung Företag¬samhet í Svøríki. Samstundis gjørdist Ung Virk¬somhed í Danmark limur í Young Enter¬prise Europe (YEE), sum er felagsfyri¬sitingin fyri líknandi verk¬ætlanir í øðrum europeiskum londum. YEE fevndi tá um 9 lond. Í dag eru umleið 20 lond limir í YEE. Líknandi felagsskapir, Junior Achievement, eru í USA og Asiu.

**Company of the Year**

Í Føroyum verður besta virkið valt burtur¬úr. Avgerðin verður tikin 19.-21. mars 2009. Hetta virkið hevur síðani møgu¬eika fyri at luttaka í DM í "Dansk Industri", Keypmanna¬havn 23.-24. apríl 2009 og í eini europeiskari kapping, sum Young Enterprise Europe skipar fyri á hvørjum ári í juli/august. Tað besta virkið har verður útnevnt sum Company of the Year.

## Feløgini

Í ár eru 17 virki við í kappingini um at gerast besta unga virkið. Hesi virkini eru íognarfeløgini niðanfyri:

| | |
|---|---|
| **Alt í Einum** | Føroya Handilsskúli, Tórshavn |
| **Desember** | Føroya Handilsskúli, Tórshavn |
| **Dims** | Føroya Handilsskúli, Tórshavn |
| **Fjari** | Føroya Handilsskúli, Tórshavn |
| **Gestavirki 1** | Karleby Handilsinstitut, Helsinki |
| **Gestavirki 2** | Karleby Handilsinstitut, Helsinki |
| **Heavy Metal** | Tekniski Skúlin, Klaksvík |
| **Isi** | Føroya Handilsskúli, Kambsdalur |
| **KRIA** | Føroya Handilsskúli, Tórshavn |
| **Mouse House** | Tekniski Skúlin, Klaksvík |
| **Nimo** | Føroya Handilsskúli, Kambsdalur |
| **Nukik** | Føroya Handilsskúli, Kambsdalur |
| **Odor** | Tekniski Skúlin, Klaksvík |
| **Opulentia** | Tekniski Skúlin, Klaksvík |
| **Sjoku** | Tekniski Skúlin, Klaksvík |
| **Sólarrisið** | Føroya Handilsskúli, Tórshavn |
| **Sunaru** | Føroya Handilsskúli, Kambsdalur |